Felags foreldrafundur 15.september 2026

Skrá:

Vælkomin

Starvsfólk, t.e. námsfrøðingar, lærarar, leiðsla, skrivstova og hjálparfólk presentera seg.

Val av skrivara

Katrin Elisabeth Lydersen Jacobsen, mamma Jan Selmar í 3. flokki.

Tóra Joensen, lærari í Stranda Skúla og ráðgevi hjá Betri Vinum, hevur framløgu um Betri vinir

Tóra, Áki og Andriása eru partur av toyminum Betri vinir, sum ferðast kring landið og greiðir frá arbeiðinum og tilgongdini Betri vinir.

Betri vinir er eitt átak, har roynt verður at betra um felagsskapin. Føroyska tilfarið er týtt og tillagað úr danska tilfarinum, Fri for mobberi, sum er grundað á avstralskt tilfar, ið Mary drottning tók við sær til Danmarkar.

Tóra greiðir frá, hvussu týdningarmikið tað er at vit lyfta í felag at tryggja tryggan felagsskap.

- Tolsemi er týdningarmikið, tá børn koma í 4. flokk broytir felagsskapurin seg ofta. Børn spegla sær fyrst í foreldrum sínum og síðan í floksfeløgunum. Tí er týdningarmikið, at kjarnan er í lagi.
- Vit eru farin frá at tosa um happara og tann happaða, til at tosa um eina ‘happara’mentan, t.e. at felagsskapurin hevur oyðileggjandi mentan fyri felagsskapin
- Dømi við søgu um Mads, sum nú er vaksin, men var happaður sum barn.
- Granskarar gjørdu spurnarkanning, 1 bólkur av spurningum var afturgangandi, tað var har sum m.a. tøgnmentan og isolering var galdandi. Í hesum bólkum sást meira happing.
- Týdningarmikið at gera okkurt, mann kann savnast um, t.d. við tónleiki ella sangi. Í Lítlaskúla er upplagt at brúka Gurðið og Gurðun Sólju.
- Innanfyri – uttanfyri. Tað er umráðandi at finna ein felagsskap, so mann ikki kennir seg uttanfyri. Vit menniskju hava tørv á felagsskapi, tí vit hava trongd á at hoyra til sum sosialir skapningar. Her mugu vit vaksnu vera klár at hjálpa til.

- Happing er sum ein motorur. Jú longri happingin koyrir, jú lættari/skjótari er at venja seg við tað í felagsskapinum.
- Dømissøga um mammu, sum ringdi til flokkin um, at dótturin skuldi í svartan niðurdeil og hava drekkijoghurt við.
- Dømissøga við Mads, sum ikki kundi taka orðið um yndisevni í flokkinum, tí hann skuldi verða tigandi har: hann var fastlæstur í sínum leikluti.
    - Her skulu vit vaksin vera vakin og kanna nærri, hví eitt barn m.a. tigur ella altíð er einsamalt.
- Granskarar: vit mugu styrkja flokkin: trivnaðin, sosiala kapitalin (hyggið hvønn annan í eyguni, heilsið uppá øll)
- Filmur vístur: Happing er trupulleikin hjá børnunum, men ábyrgdin hjá teimum vaksnu!
- Dømissøga, úr handilssøgu, relatiónir/bond knýtt, so er ikki so lætt at slíta hesi.
- Betri vinir byggir á Fýra virðir:
    - Tolsemi
    - Virðing (handling)
    - Umsorgan
    - Dirvi (at siga frá í felagsskapinum).
- Tað finnast ikki ónd børn, men ónd mynstur.
- Dømi við samrøðumyndum, sum lýsa eina støðu, ið børn saman við vaksnum skulu savnast saman at tosa um.
- Dømi við massagusøgum, har vaksin sigur søgu, meðan børn massera hvønn annan á rygginum
- Stuðla barninum at spæla við ymisk børn - bæði í skúlatíð og eftir skúlatíð
- Minnist til, at børn gera sum tey vaksnu gera, ikki sum tey siga.
- Skipa fyri tiltøkum FYRI ØLLUM, og raðfestið føðingardagar høgt -> bjóðið øllum við
- Spyr um barnið virkar kedd/ur
- Ver opin, tá onnur foreldur venda sær til tín við trupulleika hjá barni sínum
- Vís áhuga fyri 'lívinum á netinum' hjá barninum
- Ráð frá politinum til foreldur: spyr, fylg við, tosa við barnið
- Eru trupulleikar millum børn, minst so til, at børnini ikki eru trupulleikin -> hyggið at mentanini!
- Tóra endar við at rósa skúlanum fyri, at vit eru rúmlig og hava góðar karmar. Hon leggur okkum eina við, at seta felags mál og at styrkja samstarv millum heim og skúla.

Kunning um Stýrið í Lítlaskúla

Í stýrinum sita tvey foreldur sum umboð fyri børnini á Lítlaskúla. Sunnuva og Christina eru í løtuni umboð, og Christina greiðir frá arbeiðinum í stýrinum.

- Stýrisarbeiði fevnir um at viðgera innkeyp, skúlatúrar, fíggjarætlan og skúlagjald. Foreldur verða mæld til at upprætta fasta gjaldsflyting, her kann leisla skúlans hjálpa.
- Stýrið starvast um at bøta spæliøki og hevur ynski um at verða ein berandi inkluderende skole
- Ynski hjá Christinu er, at næmingatalið fer at vaksa
- Tørvur er á nýggjum skúlastýrislimi, tí Sunnuva tráðkar frá, men tørvur er eisini á øðrum, ið hava hug at hjálpa og geva teirra ískoyti vid onkrum, ið ein metir er viðkomandi ella kann hjálpa felagsskapinum og børnunum
- Sunnuva, sum hevur sitið í 4 ár, greiðir frá, at talan er um tríggjar fundir um árið, og at arbeiðið er sera mennandi
    - Sunneva verður heiðrað við avbera vakrum blómutyssi og hjartaligari takkarkvøðu frá Gunvør vegna Lítlaskúla

Val av foreldraumboði til stýrið í Lítlaskúla

- Ein seðil gongur runt, sum mann kann skriva seg á, um áhugi er at stilla upp til Stýrið: John Martin Bisp Winther og Kjartan Hansen stilla upp fyri fyrstu ferð, Christina stillar upp aftur.
- Vit kanna, hvussu viðtøkurnar ljóða, tí áhugi er fyri, at øll trý umboðini verða vald. Viðtøkurnar siga, at tvey foreldraumboð skulu veljast og eitt eykaumboð skal veljast fyri foreldrabólkin.
- Vit viðtaka hervið á fundinum, at øll trý uppstillaðu foreldravalevnini verða vald í Stýrið og at tey sjálvi fáa loyvi at skipa seg.

Sangir

- Felagssangur: Boðar tú til allar tjóðir

Vit fara út í flokkarnar